# Døgnrapportin



*Bilurin koyrdi harðliga upp um ein betongkant, so tann aftari aksulin brotnaði*

*Mynd: Eirikur Lindenskov*

## Onki koyrikort og ongar nummarplátu

Ein ungur drongur kann vænta sær eina heilsan frá fútanum eftir at hann ikki dugdi sær hógv í fríggjakvøldið. Hendingin fór fram um átta tíðina fríggjakvøldið uppi á Tjaldursvegnum í Havn. Saman við øðrum høvdu unglingar fingið fatur á einum gomlum, reyðum BMW, sum teir fóru avstað við.

Men tann túrurin endaði líka brádliga, sum hann byrjaði, tí teir koyrdu nakað harðliga upp um ein betongkant, so tann aftari aksulin brotnaði og stóð sum í berginum.

Løgreglan kom á staðið og hóast unglingarnir royndu at renna undan, fekk løgreglan fatur á bilføraranum, sum er føddur í 1991 og sostatt var ov ungur at koyra bil. Men bilurin hevði heldur ongar nummarplátur, so hann kemur eisini at standa til svars fyri at koyra óskrásettan bil. Drongurin játtaði seg sekan, og kann vænta sær eina heilsu frá fútanum.

## Sama grannalag rakt

Fríggjadagin fekk løgreglan fráboðanir um herverk á átta bilar í sama grannalagi í Vesturbýnum í Havn; í Slættalíð, á Fugloyarvegi og í Dalatúni.

Av tí, at talan er um sama grannalag, hevur løgreglan illgruna um, at talan er um somu gerningsmenn, sum hava fingið tíðina at ganga við at bróta spegl, rútar og annað.

## Koyrdu við kenning

Fýra mans vórðu tiknir fyri at koyra við kenning:Ein í miðbýnum í Havn, ein á oyggjarvegnum og tveir í Vági. Teir frætti nærri frá løgregluni, og kunnu vænta sær at missa koyrikortið.

## Órógvað almenna friðin

Fyrst fóru tríggir ungir mans til hendurs í Steinatúni, men har kom løgreglan skjótt á staðið og tók menninar. Seinni fóru tríggir aðrir mans til hendurs og eisini har var løgreglan uppi í. Nú skulu avhoyringar vísa, um onkrir av teimum verða skuldsettir fyri harðskap, ella um teir sleppa við eini bót fyri at hava órógvað almenna friðin.

## Ófriður í Fuglafirði

Sunnunáttina var herverk í busskýlinum uttanfyri Mentanarhúsið, har unglingar brutu rútar. Vitni hava sæð tilburðin, og er teirra frágreiðing somikið góð, at gerningsmenninir helst verða tiknir og skuldsettir.

Um sjeytíðina sunnumorgunin var ein bátur nýtslustolin í Fuglafirði. Illgruni er um gerningsmannin, og verður málið nú kannað. Báturin varð funnin aftur í Leirvík um 9 tíðina.

Um 8 tíðina sunnumorgunin var aftur herverk í Fuglafirði, hesaferð á havnarøkinum, har ótangar hava brotið fleiri rútar á bátum. Løgreglan veit ikki hvør hevur gjørt herverkið, men helst hevur tað samband við bátin, sum onkur hevði lænt yvirum til Leirvíkar.

## Ónøgdur við taxa

Sunnunáttina var ein maður so ónøgdir við tænastuna, hann fekk frá einum hýrivognsførara, at hann hevndi seg. Talan var um ein kenning hjá løgregluni.

Maðurin ætlaði sær at leiga bilin ein túr, men førarin metti ikki, at hann var skikkaður at fáa í bilin og vísti honum frá sær. Hetta hóvaði ikki manninum, og tá ið hann eina løtu seinni kom framvið hýrivogninum aftur, gjørdi hann ikki mætari enn at lamma eina fløsku inn ígjøgnum rútin.

Løgreglan kom á staðið og tók mannin við sær á støðina, har hann svav rúsin av sær. Hann slapp útaftur sunnudagin. Maðurin verður skuldsettur fyri herverk.

## Eldur í skorsteini

Um middagsleitið sunnudagin vóru bæði sløkkiliðið og løgreglan boðsend niðan í Christiansgøtu við Løgmannabreyt, har eldur var í einum skorsteini. Skaðin fevndi bert um skorsteinin.

## Ferðsluóhapp inni á Sundi

Í øllum mjørkanum mánamorgunin var eitt ferðsluóhapp inni á Sundi um 8 tíðina. Tveir bilar høvdu rent saman og annar fór somikið nógv útav vegnum, at hann varð háløður upp av sløkkiliðinum. Ongin persónskaði var.

## Eldur í bili

Um 9 tíðina mánamorgunin var boðað frá eldi í einum bili í niðaru rundkoyringini við Skansan. Bilurin stóð í ljósum loga, sum sløkkiliðið mátti sløkkja. Óvist er, hví eldurin kyknaði, og tí er bilurin sendur niðan á Akstovuna, har hann verður kannaður.

**rd og áb**







TOYOTA AVENSIS 2,0 DIESEL D4-D — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** JG 287 **Km:** 140.000
**Árgangur:** 25.02.02

**Kr. 145.000,-**



TOYOTA AVENSIS 1,8 SOL SEDAN — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** VA 671 **Km:** 50.000
**Árgangur:** 18.06.03

**Kr. 198.000,-**



CITROEN C5 EXCLUSIVE V6 — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** VA 620 **Km:** 42.000
**Árgangur:** 12.06.03 **Seinast sýnaður:** 12.06.03

**Kr. 185.000,-**



TOYOTA TOYOTA CAMRY 2,2 — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** BS 549 **Km:** 150.000
**Árgangur:** 07.09.99

**Kr. 148.000,-**



TOYOTA YARIS 1,0 H/B TERRA

**Skrásetingarnr:** VD 459 **Km:** 94.000
**Árgangur:** 21.04.99 **Seinast sýnaður:** 23.05.05

**Kr. 57.000,-**



TOYOTA COROLLA 1,6 LUNA L/B

**Skrásetingarnr:** UH 650 **Km:** 106.000
**Árgangur:** 28.09.98 **Seinast sýnaður:** 02.12.05

**Kr. 48.000,-**

Fyrivarni ver ur tikið fyri møguligum prentvillum.



FIAT DABLO 1,2 — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** GT 992 **Km:** 79.000
**Árgangur:** 04.04.02

**Kr. 85.000,-**



SKODA OCTAVIA 1,6

**Skrásetingarnr:** FJ 392 **Km:** 78.000
**Árgangur:** 01.12.00 **Seinast sýnaður:** 20.08.04

**Kr. 65.000,-**



FIAT STILO — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** MG 883 **Km:** 48.000
**Árgangur:** 01.07.02 **Seinast sýnaður:** 21.02.06

**Kr. 95.000,-**



TOYOTA AVENSIS 2,0 TD

**Skrásetingarnr:** PD 445 **Km:** 235.000
**Árgangur:** 03.09.99 **Seinast sýnaður:** 15.01.07

**Kr. 68.000,-**

Lagalig fígging fæst til brúktu bilarnar

6 mánaða garanti

**Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, i eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
Kom og vitja okkum · landsins fremstu bilasølu.

Vegurin Langi • Hoyvík • Tel. 353040 • Fax 353041
rs@reyniservice.fo • www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F